DANMARKS NATIONALBANK




# 31. mai 2026

## Danskir 1000-krónuseðlar og eldri seðlar verða *virðisleysir*

Danski 1000-krónuseðilin frá 2009-røðini og nakrir eldri danskir seðlar fara úr gildi eftir 31. mai 2026. (Á baksíðuni sært tú eitt yvirlit av øllum teimum seðlunum, sum verða virðisleysir).

**Tvær ymsar freistir í Føroyum og Danmark**
Í Føroyum er seinasta freist at lata seðlarnar inn í bankanum fríggjadagin 29. mai 2026. Á teimum trimum innflýggjanarstøðunum hjá Danska Tjóðbankanum í Danmark er seinasta freist sunnudagin 31. mai 2026. Eftir hetta eru seðlarnir virðisleysir.

**Áðrenn tú møtir upp**
Tað kann henda, at bankin biður teg um at skjalprógva ella greiða frá, at tín reiði peningur er fingin til vega á lógligan hátt. Tað er orsakað av galdandi reglum fyri hvítvask.

Um tú vilt innloysa reiðan pening á teimum trimum innflýggjanarstøðunum hjá Danska Tjóðbankanum í Aarhus, Odense og Keypmannahavn, sum verða rikin í samstarvi við FOREX, skalt tú altíð útfylla og prenta eina skrivliga váttan heimanifrá. Tú skalt møta upp fysiskt og vísa prógv við mynd. Tú kanst ikki senda reiðan pening til Danska Tjóðbankan, FOREX ella innflýggjanarstaðið. Les um, hvat tú skalt hava við, á forexvaluta.dk/ugyldige-pengesedler.

Við upphæddum á 50.000 DKK ella meira skalt tú senda skjalfestingina til FOREX frammanundan á teldupost: nationalbanken@forexvaluta.dk. Tá skjalfestingin er góðkend av FOREX, fært tú boð um, at tú kanst vitja eitt av innflýggjanarstøðunum.

**Málsviðgerð**
Á teimum trimum innflýggjanarstøðunum kanst tú vænta eina viðgerðartíð á upp til 6 vikur. Viðgerðartíðin kann vera longri, um FOREX ella Danski Tjóðbankin hava tørv á fleiri upplýsingum. Um tú í seinasta lagi 31. mai 2026 hevur sett teg í samband við innflýggjanarstaðið um innflýggjan av ógildigum seðlum, verður málið liðugt viðgjørt – eisini eftir freistina. Tað er dagurin, tá málið verður skrásett, sum er avgerandi.



**Tú finnur innflýggjanarstøðini í Danmark her:**

**FOREX**
Banegårdspladsen 20
8000 Aarhus C

**FOREX**
Nørre Voldgade 90
(ved Nørreport)
1358 København K

**FOREX**
Ørbækvej 75
(i Rosengårdcentret)
5220 Odense SØ

*Les um upplatingartíðir, og hvat tú skalt hava við, á forexvaluta.dk/ugyldige-pengesedler.*

# Ógildigir danskir pengaseðlar

Virðisleysir eftir 31.mai 2026



Býtisrøðin – 1944



Andlitsmyndir og djór – 1952



Andlitsmyndir og djór – 1972



Andlitsmyndir og  kirkjulist – 1997



Brýr og fornleivdir – 2009

### Ver varin við svikarum

Minst til, at svikarar kanska fara at royna at fáa teg at lata teimum reiðan pening, t.d. við at siga, at teir koma frá Danska Tjóðbankanum ella banka tínum.

Hvørki Danski Tjóðbankin ella aðrir myndugleikar fara at seta seg í samband við teg og biðja teg lata reiðan inn pening.

Sig nei, um onnur biðja teg lata inn reiðan pening fyri tey. Tú risikerar at hjálpa kriminellum og at viðvirka til álvarsom fíggjarlig brotsverk.

# Gildigir danskir pengaseðlar

Enn gildigir eftir 31.mai 2026

50-, 100-, 200- og 500-krónuseðilin í núverandi donsku seðlarøðini (frá 2009) við brúm og fornleivdum eru einastu seðlarnir, sum eru í gildi sum gjaldoyra. Seðlarøðin er í 2020–2026 blivin trygdardagførd fyri at forða fyri royndum at falsa. Bæði trygdardagførdu og upprunaligu útgávurnar av seðlunum eru í gildi sum gjaldoyra.

Les meira á nationalbanken.dk



2009A-røðini



2009-røðini